Suðuroyggin ongan møguleika at loysa

FÓLKAATKVØÐA Í SUÐUROY
Jan Müller

– Suðuroyingar hava ongan sum helst møguleika hvørki løgfrøðiliga ella í aðrar mátar at loysa frá Føroyum. Teir fáa ikki undirtøku nakrastaðni at fáa sítt subfullveldi. Vit fáa ikki ein gang sjálvir undirtøku fyri at loysa, so tað kunnu teir ikki. Eg vóni, at hatta er skemt.

Soleiðis sigur Halgir W. Poulsen, advokatur í eini viðmerking til bræv frá seks lærarum í Suðuroy til løgmann, har teir biðja landsstýrið skriva undir uppá, at tað virðir úrslitið av eini fólkaatkvøðu í Suðuroy um, at Suðuroyggin loysir frá restini av Føroyum og framhaldandi verður í ríkisfelagsskapi við Danmark. Borgarstjórin á Tvøroyri hevur eisini verið inni á hesum somu tankum í viðmerkingum í bløðunum.

– Heilsa Finnleivi Guttesen og øðrum suðuroyingum frá mær og bið teir hyggja einaferð á Afrikakortið, tá síggja teir, at har er púra læst og fyribundið. Tað hevði verið ein stuttlig útgáva av Afrikakortinum, um tað varð teknað eftir fólkum og tjóðum, tí tað hevði verið sum eitt klútateppi av eini aðrari verð.

Halgir W. Poulsen vísir í hesum viðfangi á, at tað hava verið nógvar royndir at loysa frá nýfrælsum londum. – Tað verður alt knúst niður við harðari hond og í blóði. So tað er eingin bøn hjá suðuroyingum, teir sleppa ikki burtur úr Føroyum, um teir so standa á høvdinum. Har verða tað Nyrup og Anfinn, sum draga eina línu.

Halgir W. Poulsen dylur ikki fyri, at hann tekur ikki suðuroyingar í álvara í hesum máli og leggur aftrat, at teir bera orð fyri at vera eitt sera skemtingarsamt fólk.

Suðuroyingar vilja hava loysing frá restini av Føroyum

– Vit finna okkum ikki í meiri. Og vit eru nógv sum halda, at suðuroyingar eiga at sleppa at avgera sína egnu lagnu, siga Finn Thomsen, v.m. og Sofus Strøm. Saman við fýra øðrum hava teir sent Anfinni Kallsberg, løgmanni og Høgna Hoydal, landsstýrismanni í fullveldismálum, fyrispurning um fólkaatkvøðu í Suðuroy

– Støðan í Suðuroy er so vónleys, at fleiri tosa nú í ramasta álvara um at kanna møguleikar fyri at loysa frá restini av Føroyum

SUÐUROY
Áki Bertholdsen

– Vit halda ikki, at vit skulu finna okkum í meiri. Og ein møguleiki er heilt einfalt at taka loysing frá restini av Føroyum. Og tað eru tað nógvir suðuroyingar, sum í ramasta álvara tosa um í hesum døgum.

Tað siga teir báðir tvøramenninir Sofus Strøm og Finn Thomsen.

Teir báðir siga, at hesa seinastu tíðina hevur rættiligur uppreistrarhugur tikið seg upp í Suðuroy.

– Her er blivið heilt galið í Suðuroynni og politikararnir røra ikki ein fingur fyri at bøta um støðuna. Og vit eru sannført um, at fáa vit fullveldið, verður støðan uppaftur verri, siga teir báðir.

Tí eru tað suðuroyingar, sum í fullum álvara eru farnir at tosa um at skipa fyri fólkaatkvøðu í Suðuroynni um, at taka loysing frá restini av Føroyum.

Nógv av teimum halda, at verður álvari gjørdur burturúr ætlanini, at Føroyar skulu taka fullveldið, halda hesir somu suðuroyingarnir, Suðuroyggin skal verða verandi í ríkisfelagsskapinum.

Men teir siga, at fyrsta stigið á leiðini er at fáa at vita, hvørja lagnu ein slík fólkaatkvøða hevði fingið. Tí vilja teir hava at vita, um landsstýrið hevði viðurkent úrslitið av eini fólkaatkvøðu í Suðuroy um loysing frá restini av Føroyum.

Tí hava seks tvørafólk, sum øll eru lærarar sent Anfinni Kallsberg, løgmanni, og Høgna Hoydal, varaløgmanni, og landsstýrismanni í sjálvstýrismálum, ein formligan fyrispurning um hetta.

Teir seks suðuroyingarnir spyrja teir báðar, um landsstýrið kann skriva undir upp á, at tað virðir úrslitið av eini fólkaatkvøðu í Suðuroy um at Suðuroyggin loysir frá restini av av Føroyum og verður verandi í ríkisfelagsskapi við Danmark.

Tey, sum hava skrivað undir fyrispurningin eru Sofus Strøm, Finn Thomsen, Jónsvein Hovgaard, Súsanna Bertholdsen, Alvi Mortensen og Jacobina Thorsteinsson, sum øll eru lærarar á Tvøroyri.

Eitt neyðarróp

– Hetta skal skiljast sum eitt neyðarróp úr Suðuroy. Men tað skal eisini skiljast sum ein staðfesting av, at vit finna okkum ikki í hesari viðferðini longur, siga teir báðir Sofus Strøm og Finn Thomsen, táið vit spurdu teir, hvat lá í hesari ætlanini.

– Í løtuni er støðan tann, at útjaðarin bara letur til miðstaðarøkið. Hinvegin vil meginøkið ikki lata útjaðaranum aftur, sigur Sofus Strøm.

Hann sigur, at meginøkið fær eitt ávíst krónutal fyri at kalla hvørt kilo av allari varu, sum kemur á land í Føroyum, tí har kemur alt uppá land.

– Í hinum endanum fær meginøkið eisini eitt ávíst krónutal fyri hvørt einasta kilo av fiski, sum fer av landinum, tí eisini allur fiskurin skal avskipast um Havnina. Hann sigur, at hetta er ikki annað enn eitt slag av almennum stuðuli til miðstaðarøkið.

– Men táið tað ræður um at leggja nakað aftur út aftur til útjaðaran, eru allar møguligar forðingar í vegin.

Sofus Strøm minnir eitt nú á rokið sum stóðst av at ein lítil skúli, sum almanna- og heilsuskúlin, varð lagdur í Suðuroy.

Hann sigur, at nú Føroyar ætla at loysa frá Danmark, dugir hann ikki at síggja, hví ein útjaðari í Føroyum ikki sjálvur kann sleppa at gera av, hvønn partin, hann vil hoyra til.

Kunnu Føroyar loysa seg úr ríkinum við eini løgtingssamtykt, mugu vit eisini kunna avgera okkara egnu lagnu.

Langt úti

Finn Thomsen sigur, at hetta kann tykjast at vera langt úti.

– Men støðan er álvarslig. Tað hendir onki í Suðuroynni og plássið verður drenað fyri ungdóm, sum ikki fær møguleikan at fáa arbeiðið her suðuri.

Hann sigur fólk eru um a missa vónina um at nakar bati er á veg, tí ongastaðni hómast nakrar sum helst ábendingar um, at ætlanin er at seta politiskt tiltøk í verk fyri at skapa møguleikar fyri framburði í Suðuroynni. Og vónin er tað ringasta, tú kanst taka frá fólki.

Sofus Strøm og Finn Thomsen siga, at ætla politikarar at Suðuroyggin skal aftoftast, eiga teir at vera so mikið reiðiligir at teir siga sum er, tí so vita suðuroyingar tað.

– Er ætlanin hinvegin at varðveita Suðuroynna sum ein part av Føroyum, mugu teir leggja eina ætlan fram um, hvussu teir ætla at gera tað.

– Misnøgdin við førda politikkin er nú so stór, at hevði fólkatkvøðan verið, ivast vit ikki í, hvat úrslitið av eini fólkaatkvøðu hevði verið, siga teir báðir.

Teir báðir viðganga, at tað er málið um oljuhavnina, sum fekk bikarið at flóta yvir. Men tað eru so nógv onnur viðurskifti, sum ganga tann skeiva vegin í Suðuroynni. Aldursbýtið er heilt avlagað, tí ungdómurin fær ikki møguleikar fyri at verða verandi, inntøkurnar eru nógv lægri enn hjá fólki í restini av landinum o.s.fr.

60 ára gomul og designari

Aldur er eingin forðing fyri at bróta uppúr nýggjum. Hetta hevur Borgny Dam Patursson úr Havn prógvað. Hon hevur júst lokið útbúgving sum designari, hóast hon er farin um tey trýss, og hon hevur longu fingið tær fyrstu bíleggingarnar uppá síni design

ÚTBÚGVING
Stefan í Skorini

60 ára gamla Borgny Patursson hevur júst fingið prógv á designskúla í Danmark. Hon hevur bara nýtt føroyskt tilfari til síni klædnapløgg

26. januar fekk Borgny prógv handað á Københavns Mode- og Designskole. Hennara prógv var ímillum tey bestu, sum vórðu givin á skúlanum í ár.

Í oktober mánaða í fjør hevði Borgny ein annan merkisdag í hennara lívi. Tá hevði hon 60 ára føðingardag. Aldurin hevur tó ikki forðað henni í at fara undir nakað nýtt og at royna tað ókenda. Sig so tað at ein ikki lærir – alt lívið.

Bara føroyskt

Borgny fekk brell at fara at læra seg nakað meira innan design, eftir at hon hevði havt eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

– Tað gekk so væl á hesi framsýningini, og alt varð selt. Tí vildi eg læra meg meira innan hetta yrkið og finna nýggjar hættir at arbeiða við føroyskum tilfari, sigur Borgny.

Tað, sum er sermerkt við klæðunum hjá Borgny Patursson, er, at hon bara nýtir føroyskt tilfar, tá hon framleiðir síni design.

– Meðan eg var á skúlanum brúkti eg bara føroyskt tilfar til míni klæði. Hetta hevði við sær, at eg ikki kundi fara at keypa ta lidnu vøruna, men var noydd at sita heima og virka klædnatilfarið til, sigur Borgny.

Borgny tøvdi, bant, og eisini brúkti hon føroysk seyðaskinn frá Vilmu í Havn. At hon bara brúkti føroyskt tilfar hevði við sær, at tað var kostnaðarmikið hjá henni at fáa tilfarið til vega.

– Tey flestu á skúlanum høvdu meira hug til nakað meira moderna so sum lakk og leður, og tí var tað eitt sindur óvanligt, at eg bara hevði føroyskt tilfar til míni klæði.

Fingið bíleggingar

Hóast Borgny er liðug við skúlan, so kemur hon ikki heimaftur rættiliga enn, tí hon hevur fingið nakrar bíleggingar frá fólki, sum fegin vilja hava hennara klæði. Hesi skal hon so gera, áðrenn leiðin gongur til Føroyar.

Eisini stendur Borgny í boði at framleiða klæði til ein mótahandil, sum letur upp í Keypmannahavn skjótt. Lærarin hjá Borgny er ikki í iva, tí »det bliver revet væk«, sum lærarin málber seg um klæðini hjá Borgny.

– Eg vil fegin gera føroyska tilfarið kent uttanlands, og eg havi eisini roynt at gera heilt nýtt klædnatilfar.

Prógvið hjá Borgny var ímillum tey frægaru á skúlanum, og hon fekk 9,1 ímeðal. Hetta er ein altjóða skúli, og fólk úr øllum heraðshornum ganga á hesum skúlanum. Skúlagongdin er tvey ár, og trý lið við eini fimtan næmingum ganga har í senn.

Borgny sigur, at hetta er ein harður skúli, og at ein verður noyddur at hanga í, skal tað ganga. Hon var elsti næmingurin, tey nakrantíð hava havt, og tann næstelsti var um tey tredivu.

Tá seinasta royndin var á skúlanum, varð skipað fyri mótaframsýning, har dómari skuldi døma um arbeiðið.

Til hetta høvið hevði Borgny valt at hava eitt tema um Antarktis.

– Til klæðini á tí seinastu framsýningini hevði eg fingið íblástur frá kava og sletum og tílíkum. Hetta vóru tískil heit klæði, sum eg vísti fram, sigur Borgny. Á hesi framsýningini var tað kenda modellið Oliver Bjerrehus, sum gekk í klæðunum hjá Borgny, og tað var góð reklama fyri hana.

Tíðindi frá Ferðslutrygd

Mega í rættin

Løgreglan fær ferð eftir ferð spurningar frá fólki, um tey áttu at meldað ávísar hendingar í ferðsluni - sum t.d. vandamiklar yvirhálingar. Um hetta sigur løgreglan, at einki gagn er í hesum, uttan so er, at vitni eru til slíkar hendingar, og at tey vilja koma í rættin at vitna. Verða tílík brot á ferðslulógina ber fráboðað, standa orð móti orði, og tá fær løgreglan einki gjørt við málið.

Koyring uttan nummarspjøldur

Fleiri fyrispurningar hava verið, um stórir lastbilar og sokallaðir dumparar hava loyvi at koyra uttan nummarspjøldur á kommunalum vegi ella landsvegi.

Útgangsstøðið er, at einki tílíkt akfar hevur vanliga loyvi at koyra óskrásett á almennum vegi. Í einstøkum førum kunnu tílík akfør tó fáa undantaksloyvi, um t.d. eitt stórt arbeiðsplass er við ein landsveg, og hesi akfør viðhvørt mugu fara út á alfaraveg. Men loyvi verður ikki givið til veruliga koyring á almennum vegi. Tó er at viðmerkja, at hóast eitt akfar, t.d. ein dumpari, ikki hevur vanligt nummarspjaldur, so kann hann hava eitt royndarspjaldur,ið t.d. loyvir koyring millum eitt arbeiðsplass og verkstað, so sum dømi er við onkrum tílíkum akfari, sum arbeiðir í tunnlinum undir Vestmannasundi.

Tekur tíð at missa koyrikortið

Spurningurin hevur tikið seg upp, hví løgreglan ikki beinanvegin tekur koyrikortið frá einum bilførara, ið verður tikin, og sum sjónliga er ávirkaður av rúsdrekka. Veruleikin er tann, at um ein tílíkur bilførari er sjónliga ávirkaður, so tekur løgreglan helst koyrikortið beinanvegin. Men hesin persónur kann kortini fáa fyribils loyvi at koyra, til blóðroyndin er kannað, og dómur er fallin. Løgreglan er ikki dómsvald, og dømt kann ikki verða í tílíkum máli, fyrr enn prógvini eru til skjals. Og tað kann vara einar 14 dagar, áður enn blóðkanningarúrslitið er komið løgregluni aftur í hendi.

Um so er, at løgreglan hevur tikið koyrikortið á staðnum, og viðkomandi bilførari verður dømdur at missa koyrikortið, so er frádømingartíðin galdandi frá tí degi, løgreglan tók koyrikortið, og ikki frá tí degi, táið dómur er feldur í málinum.

Fishing 2001
March 22-24 • Glasgow • Scotland

petur & petur 320 870

Fiskivinnuframsýningin Fishing 2001 verður í døgunum 22. - 24. mars 2001 í Scottish Exhibition Centre í Glasgow. Flogfelag Føroya bjóðar ferð og uppihald á ☆☆☆☆ ella ☆☆☆ hotelli. Farið verður úr Vágum hósdagin 22. mars kl. 07.00 og komið verður aftur sunnudagin 25. mars 09.00

Kostnaður fyri ferð og uppihald:

	☆☆☆☆	☆☆☆
á einkultkamari	kr. 8.485,-	kr. 7.885,-
á dupultkamari	kr. 7.385,-	kr. 6.585,-
bert flogferð báðar vegir		kr. 4.000,-
bert flogferð einvegis		kr. 3.000,-

Um tygum ynskja at vera við, so setið tygum í samband við okkum:
e-mail travel@ff.fo • tlf 340 000 • fax 340 011

FLOGFELAG FØROYA

Áarvegur 6 • P.O. Box 3225 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands